# Sosiologi og mentan (skeið 2362.17) – heystið 2019

*Dagført 15. august 2019. Broytingar kunnu koma fyri.*
*Undirvísarar: Firouz Gaini (FG), ábyrgd (**firouzg@setur.fo**), Jan Jensen (JJ) og Turið Hermannsdóttir (TH)*
Bók at keypa: Eriksen, T.H. 2010. *Små steder store spørsmål. Innføring i sosialantropologi* (3.útg.), Oslo: Universitetsforlaget

| N | Tíð | Evni | Pensum | Fak |
|---|---|---|---|---|
| **1** | 29. aug.<br>Kl. 09-12<br>FG | **Innleiðsla**. Almenn kunning um skeiðið, innlatingar, pensum, próvtøku, o.s.fr. Innleiðsla til sosiologi sum vísindagrein: Hvat er sosiologi og sosiologiski arbeiðshátturin? Hvat er eitt samfelag? Hvat er sosiologisk ástøði? Vit hyggja at høvuðsrákunum og –evnunum í fakinum frá byrjanini og fram til í dag. | Fulcher&Scott 2011. Kap 1,2 (s.3-68)<br>Giddens 2009. Kap 3 (s. 67-104) | S |
| **2** | 5. sept.<br>Kl. 09-12<br>FG | **Antropologi og mentan**. Innleiðsla til antropologi sum vísindagrein. Hvat er antropologi (mannfrøði)? Hvat er munurin á antropologi og sosiologi? Hvat er feltarbeiði og etnografi? Vit hyggja at søguni hjá fakinum við serligum atliti til týðandi ástøðiligar skúlar og paradigmur. | Eriksen 2010. Kap 1,2,3 (s.13-49)<br>Miner 1956. 5 s.<br>Sharp 1968. 12 s. | A |
| **3** | 12. sept.<br>Kl. 09-12<br>FG<br>Innlating1 | **Arbeiðslív, stættir og flytføri**. Í hesum seminari kanna vit hvussu arbeiði og framleiðsla verða skipaði í tí modernaða kapitalistiska ídnaðarsamfelagnum. Vit hyggja eisini at ástøði um stættir, sosiala stratifisering og flytføri (mobiliteti). Hvussu viðkomandi er hetta fyri samfelagsreiningar í 21. øld? | Fulcher&Scott 2011. Kap 17 (s.647-691)<br>Giddens 2009. Kap 11 (s. 429-471) | S |
| **4** | 19. sept.<br>Kl. 09-12<br>TH | **Medisinsk antropologi**. Hvat er medisinsk antropologi? Her verður tikið støði í mentanarligar konstruktiónir av heilsu/sjúku/likam. Dømir um medisinsk antropologiskari gransking verður tikið frá TH (undirvísari). | Carsten 2003. Kap. 7 (s.163-183)<br>Helman 2001. Kap 6,7 (s.108-135)<br>Stone 2010. Kap 9 (s.289-312) | A |
| **5** | 26. sept.<br>Kl. 09-12<br>TH | **Familjurelatiónir og kyn**. Hugt verður eftir familju (kinship) sum mentanarliga institutión og kritiskt diskuterað. Vit leggja út við nøkur klassisk antropologisk dømi uppá familju-strukturar og reflektera eitt sindur um føroyskar familju-strukturar. Síðani hyggja vit at familjurelatiónum úr einum kynsperspektivi og kanna hvat sambandið er millum kyn og familja, og hví vit 'eiga at' hava eitt kynsperspektiv tá vit granska familjur. | Eriksen 2010. Kap 8,9 (s. 113-142)<br>Carsten 2003. Kap 3 (s.57-82)<br>Keesing & Strathern 1998. Kap 12 (ss.270-281) | A |
| **6** | 3. okt.<br>Kl. 09-12<br>FG | **Kyn og familja í sosiologiini.** Vit fara nú at arbeiða víðari við vísindaligum kanningum av kyni og familjulívi. Hvat er ein familja? Hvønn leiklut hevur familjan í modernaða samfelagnum? Hvørji ástøði eru um familjuskipanir? Vit hyggja eisini at kynssamleikum og muninum á 'sex' og 'gender'. | Giddens 2009. Kap 9,14 (s. 327-379, 575-623)<br>Gaini 2017. 20 s. | S |
| **7** | 10. okt.<br>Kl. 09-12<br>FG | **Ójavni, vælferð og fátækradømi**. Hesaferð hyggja vit nærri at nøkrum av teimum evnunum og hugtøkunum, sum sosiologar hava arbeitt mest við síðan vísindagreinin tók seg upp – t.d. stætt og stættarsamfelag, vald og eksklusión, fátækradømi og vælferð í ymsum tíðarskeiðum og londum. | Giddens 2009. Kap 12 (s. 475-518)<br>Fulcher&Scott 2011. Kap 18,19 (s. 695-783) | S |
| **8** | 24. okt.<br>Kl. 09-12<br>JJ<br>Innlating2 | **Antropologi og (post)-kolonialisma.** Kolonialisma hevur spælt ein stóran leiklut innan antropologi, bæði sum analystiskt- og metodologiskt evni. Vit taka útgangsstøði í tí postkoloniala rákinum uml. 1970ini og viðgera evni sum *vald* og *representatión* innan antropologiska gransking. Tímin verður eisini ein fyribils innleiðing til ta antropologisku gransking, sum er av tí meira kritiska slagnum. | Asad 1973. (s. 9-19)<br>Comaroff & Comaroff 1986. (s. 1-22)<br>Lewis 1973. (s. 581-602)<br>Said 1978. (s. 9-36) | A |
| **9** | 31. okt.<br>Kl. 09-12<br>JJ | **Antropologi og átrúnaður**. Síðan tær fyrstu antropologisku kanningarnar hevur átrúnaður verið eitt afturvendandi evni. Vit hyggja at nøkrum av teimum grundleggjandi ástøðiligu hugtøkunum viðvíkjandi átrúnaði innan antropologi. Sum nakað grundleggjandi lesa vit eisini ein úrdrátt úr klassiskari kanning. Til endans tosa vit eitt sindur um kristindómsantropologi, sum er eitt vaksandi evni. | Durkheim 1915. (s. 1-18)<br>Evans-Pritchard 1937. Kap 2 (18-32)<br>Eriksen 2010. Kap 14 (s. 207-222)<br>Weber 1930. Kap 2 ( s. 47-78) | A |
| **10** | 7. nov.<br>Kl. 09-12<br>FG | **Aldur og lívsskeið í modernaða samfelagnum.** Hetta seminarið lýsir og greinir sosialvísindaligar kanningar av barna- og ungdómslívi, vaksnamannalívi og aldurdómi. Eisini verður hugt at kyni og sosialisering. Vit brúka dømi úr føroyskari ungdómsgransking í kjakinum um aldur og lívsskeið. | Giddens 2009. Kap 8 (s. 281-324)<br>Gaini 2007. 45 s.<br>Gaini 2005. (s. 94-101) | S |
| **11** | 14. nov.<br>Kl. 09-12<br>FG | **Globalisering, mørk og sosialar broytingar**. Vit arbeiða í hesum seminari við spurningum um traditión/modernitet og globalisering í mentanarligum, sosialum, búskaparligum og politiskum kontekstum. Vit knýta sosiologisk og antropoligisk sjónarmið saman. Vit taka at enda samanum skeiðið sum heild. | Giddens 2009. Kap 4 (s. 107-149)<br>Eriksen 2010. Kap 19 (s. 283-300)<br>Eller 2016. Kap 13 (s. 253-273) | A/S |

**Heimildir**


Asad, T. 1973. Innleiðing í Asad, T. (ritstj.) Anthropology and the Colonial Encounter. London: Ithaca Press
Carsten, J. 2003. After Kinship. Cambridge: Cambridge University Press
Comaroff, J. & Comaroff, J. 1986. *Christianity and Colonialism in South Africa*. American Ethnologist 13(1):1-22.
Durkheim, É. 1915. Innleiðing í The Elementary Forms of Religious Life. London: Allen & Unwin
Eller, J.D. 2016. Cultural Anthropology. Global Forces – Local Lives (3.útg.) Abingdon: Routledge
Eriksen, T.H. 2010. Små steder – store spørsmål (3.útg.) Oslo: Universitetsforlaget
Evans-Pritchard, E.E. 1937. Witchcraft, Oracles, and Magic among the Azande. Oxford: Clarendon Press
Gaini, F. 2017. *'Crack in the Ice': Marginalization of Young Men in Contemporary Urban Greenland*. In Haywood, C. and Johansson, T. (ritstj.) Marginalized Masculinities. Contexts, Continuities and Change. New York and Oxon: Routledge
Gaini, F. 2007. Ungdómur og ungdómsgransking. Smárit. Keypmannahavn: Underskoven
Gaini, F. 2005. *Ungdómsins býur*. In Mortensen, A. (ritstj.) Fólkaleikur. Heiðursrit. Tórshavn: Faroe University Press
Giddens, A. 2009. Sociology (6.útg.) Cambridge & Malden (USA): Polity Press

Helman, C.G. 2001. Culture, Health and Illness (4.útg) London: Arnold
Keesing, M.R. & Strathern, A. 1998. Cultural Anthropology: A contemporary perspective (3.útg.) Belmont: Wadsworth
Lewis, D. 1973. *Anthropology and Colonialism*. Current Anthropology 14(5)
Miner, H .1956. *Body Ritual Among the Nacirema*. American Anthropologist vol.58(3)
Said, E. 1978. Innleiðing í Orientalism. London and Henley: Routledge & Kegan Paul
Sharp, L. 1952. *Steel Axes for Stone Age Australians.* Human Organization vol.11(2)
Stone, L. 2010. Kinship and Gender: An Introduction (4.útg) Boulder: Westview
Weber, M. 1930. The Protestant Ethic and the Spirit of Capitalism. New York: W. W. Norton & Co.

Pensumtilfar (sum ikki er í bókini *Små steder Store spørsmål*) verður lagt út á moodle. Annað eykatilfar verður eisini lagt út á moodle.